# Dýr vika hjá Víkingi

**VODAFONEDEILDIN** Hóast Víkingur mist tríggjar spælarar í seinnu hálvfinaluni ímóti ÍF týskvøldið, er ætlanin at fáa stig burturúr ímóti oddaliðnum, HB, í Gundadali

Hilmar Jan Hansen

Sum um tað ikki var nóg ringt, at Víkingur á stokkinum misti finalusessin týskvøldið, fingu eisini tríggir av spælarunum skaðar at dragast við. Hans Jørgen Djurhuus fekk eina fipurspreinging, Sam Jacobsen koykti sær fótin og Nenad Stankovic fekk eisini onkran skaða, ið helst heldur honum uttanfyri, nú Víkingur sunnudagin klokkan 15 vitjar HB í Gundadali.

– Tað er sjálvandi ein strika í rokningini hjá okkum, at vit missa tríggjar so royndar spælarar. Men hinvegin er tað so, at fer onkur út, kemur onkur annar inn. Kanska HB í Gundadali ikki er tann dysturin, har vit vænta okkum trý stig hvørja ferð, men vit ætla okkum at fáa stig og at vinna okkum innaftur í kappingina, sigur venjarin hjá Víkingi, Jógvan Martin Olsen.

HB hevur síðani sætta umfar verið oddalið, burtur sæð frá einum umfari, og ta støðuna ætlar meistaraliðið sær eisini at verja, nú Víkingur kemur á vitjan.

– Vit hava havt onkrar skaðar, men í síðstuni hava teir flestu vant aftur. Vanliga dámar mær ikki steðgir í kappingini, men hesar síðstu tvær vikurnar hava givið fleiri møguleikan at komið fyri seg aftur, sigur venjarin hjá HB, Kristján Guðmundsson.

– Sjálvt um vit eru oddalið, so taka vit ein dyst í senn, og vit skulu vinna hvørja ferð – eisini hesa ferð. Men Víkingur hevur sín egna spælistíl, ið er rættiliga inngrógvin, so vit vita, at hetta er eitt av liðunum, tað er torført at vinna ímóti.

Tá liðini spældu í Gøtu í øðrum landskappingarumfari fyri góðum tveimum mánaðum síðani, gjørdist úrslitið ein málleysur javnleikur sigur venjarin hjá Víkingi, Jógvan Martin Olsen, ið tó kann frøast um, at Niclas Niclasen er við aftur eftir karantenu..

hilmarjan@sosialurin.fo



**JAGSTRAN**

*HB er liðið, øll hini fremru jagstra í løtuni, og sunnudagin er tað Víkingur, ið skal royna at steðga oddaliðnum*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Skerdir suðuroyingar

**VODAFONEDEILDIN** FC Suðuroy er uttan tveir av føstu verjuspælarunum, nú liðið vitjar NSÍ, sum hevur vunnið síðstu seks dystirnar á rað

Hilmar Jan Hansen

Higartil hevur FC Suðuroy bara vunnið ein dyst og spælt tríggjar javnar, so tí hevur liðið bara seks stig á aftasta plássinum. Ein av javnleikunum var suðuri í Vági ímóti NSÍ, og ta ferðina fekk FC Suðuroy tryggjað sær eina stigið við brotssparki nógvar minuttir inn í yvirtíðina. NSÍ hevur hinvegin ikki ligið á latu síðuni síðstu dystirnar, men hevur vunnið seks á rað, og tí eru runavíkingar nú á næstfremsta plássi.

NSÍ hevur eisini allar sínar spælarar tøkar til dystin ímóti suðuroyarliðnum, sum verður spældur við Løkin í morgin klokkan 15. Einasta undantakið er Karoly Potemkin, sum hevur karantenu, men hann hevur heldur ikki verið so nógv við í ár.

– FC Suðuroy hevur fleiri góðar spælarar, so hetta verður eingin lættur dystur hjá okkum. Men vit eru klárir, og hóast fleiri hava verið upptiknir av A- og U21-landsliðnum, hava vit verið fullmannaðir til venjing hesa vikuna, sigur NSÍ-venjarin, Pauli Poulsen.

> **At vit mangla tveir mans í verjuni, kemur at ávirka sælið hjá okkum**
>
> JÓN PAULI OLSEN, FC SUÐUROY

Ólíka verri sær út hjá FC Suðuroy, ið kemur til Runavíkar við skerdari verju. Karl Lisberg, sum plagar at spæla á høgra bakki, er skaddur, og neyvan verður Súni úr Hørg so mikið klárur, at hann fær spælt í miðverjuni.

– At vit mangla tveir mans í verjuni, kemur at ávirka spælið hjá okkum, tí vit noyðast helst at liggja tættir har afturi og so lúra upp á kontra. Men vit fara at royna at fáa eitt stig, tí alt munar hjá okkum, sigur Jón Pauli Olsen, venjari hjá FC Suðuroy.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Finalistar í stevnudysti

**VODAFONEDEILDIN** EB/Streymur tekur í morgin ímóti ÍF í stevnudysti við Margáir. Samstundis eru hetta tey bæði liðini, sum í vikuni tryggjaðu sær pláss í finaluni um Løgmanssteypið



**FORSMAKKUR**

*Arnbjørn Hansen og Karl Løkin fara í annaðkvøld í stevnudystinum við Margáir at geva fólki ein forsmakk uppá, hvat væntast kann av ársins steypafinalu millum EB/Streym og ÍF*

Mynd: Álvur Haraldsen

Hilmar Jan Hansen

Vinnararnir í teimum báðum seinnu hálvfinalunum týskvøldið í steypakappingini, EB/Streymur og ÍF, møtast við Margáir í annaðkvøld klokkan 19, so báðar manningarnar byrja dystin í besta hýri, sum vikan hevur lagað seg hjá teimum.

Hjá EB/Streymi er Hans Pauli Samuelsen framvegis skaddur, eftir at hann í fyrra dystinum ímóti B36 fekk eina takling niður á økilin. Og uppaftur harðari er lagnan við Alex José dos Santos, sum í fýra mánaðir noyðist at halda seg burturi frá fótbólti, til óstbeinið er komið ordiliga upp á pláss aftur.

– Vit eru rímiliga væl fyri til dystin. Og burtur sæð frá Hans Paula og Santos, so eru allir tøkir til dystin ímóti fuglfirðingum. Hetta er stevnudystur, so tað hevur nógv at siga fyri okkum, at vit fáa ein góðan dyst. Vinna vit, so eru vit ordiliga við aftur, sigur Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi.

ÍF fær hesa ferð Kaj Ennigarð við aftur, eftir at hann hevði karantenu týskvøldið, tá eisini Høgni Zachariassen aftur var á liðnum eftir skaðasteðg. Pól Ennigarð situr uttanfyri við karantenu ein dyst aftrat, og enn er heldur einki at síggja til Rógva Jacobsen, sum framvegis er skaddur.

– Vit hugsa heldur ikki so nógv um, at hetta er eitt slag av forpremieru undan steypafinaluni, men hinvegin vænti eg sjálvandi, at eg eri nakað klókari eftir dystin, um vit hugsa eitt sindur longur fram við fyrireikingunum. Nú taptu vit á heimavølli síðst, so hjá okkum ræður um at reisast aftur, sigur Abraham Løkin, venjari hjá ÍF.

Fyrru ferð, liðini hittust, var í Fuglafirði fyri góðum tveimum mánaðum síðani, og tá endaði tað við javnleiki 1-1. Tað ferðina kom EB/Streymur á odda 1-0 stutt inn í seinna hálvleik, men ímóti endanum eydnaðist ÍF at fáa javnleik

hilmarjan@sosialurin.fo

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 10 | 6 | 3 | 1 | 20 | 13 | +7 | 21 |
| 2 | NSÍ | 10 | 6 | 1 | 3 | 23 | 12 | +11 | 19 |
| 3 | ÍF | 10 | 5 | 3 | 2 | 17 | 12 | +5 | 18 |
| 4 | Víkingur | 10 | 4 | 4 | 2 | 19 | 16 | +3 | 16 |
| 5 | EB/Streymur | 10 | 4 | 3 | 3 | 16 | 12 | +4 | 15 |
| 6 | B36 | 10 | 3 | 5 | 2 | 17 | 16 | +1 | 14 |
| 7 | B68 | 10 | 3 | 1 | 6 | 17 | 21 | -4 | 10 |
| 8 | B71 | 10 | 2 | 3 | 5 | 10 | 19 | -9 | 9 |
| 9 | AB | 10 | 1 | 4 | 5 | 13 | 21 | -8 | 7 |
| 10 | FC Suðuroy | 10 | 1 | 3 | 6 | 11 | 21 | -10 | 6 |